# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Romulus aftur til heiður og æru

**Gamla kappróðrarnavnið skal nú aftur borga fyri heiðri og sigrum hjá nólsoyingum. Nýggja 6-mannafarið fær navnið Romulus, eitt navn, sum vann mangan róðurin í 50-unum**

KAPPRÓÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sjey ungar kvinnur skulu nú blása lív aftur í kappróðurin í Nólsoy.

Tær hava tikið stig til at lata nýtt 6-mannafar byggja í Kollafirði, og báturin sal verða klárur at taka í nytslu til jóla.

- Tað byrjaði kanska eitt sindur knappliga, men vit hava so umbiðið eitt 6-mannafar, sum longu er mannað. Vit byrjaðu at rennivenja 1. september, og hálvan november fóru vit eisini at venja við rógvimaskinum, sigur Elisabeth Nolsø, sum er onnur av forsprákarunum.

Ídnið og entusiasman, sum ungu kvinnurnar vísa, hevur longu smittað av sær, og Nólsoyingurin, sum í fjør nærmast upp á kvams vís varð mannaður, er longu fullmannaður til komandi ár.

Og ambitiónirnar steðga ikki har.

Tá vit hava fingið hetta 6-mannafarið, fara vit at arbeiða fyri at fáa eitt nýtt 5-mannafar til bygdina, so børnini eisini fáa møguleikan at venja segh við kappróður á ungum aldri, siga Elisabeth Poulsen og Sonja Falck, sum standa á odda fyri hesum tiltakinum.

Hóast báturin er spildurnýggjur og manningin ikki hevur róð saman áður, so hava ungu kvinnurnar góðar vónir til komandi kappróðrarár.

Men fyribils ætla tær so at fáa tað figgjarliga avgreitt, samstundis sum NÍF skal hava eykaaðalfund í desember fyri at velja nýggja nevnd.

Ætlanin er at fáa valt nýggja nevnd við undirdeildum til kappróður, borðtennis og fótbólt, sum eru greinarnar hjá felagnum, sigur Elisabeth Poulsen.

Russland-Føroyar 37-16 (19-7):

# Rós til ávísar føroyskar spælarar

**Frásøgumaðurin og viðmerkjarin hjá Rossija Sport hildu onkrar av føroysku spælarunum hava góðar dygdir**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heriss@sosialurin.fo*

Ivan Eginsson sigur úr Moskva, at Rossija Sport er ein landsdekkandi sjónvarpsstøð í Russlandi, og ein støð, sum eisini røkkur russarar uttanlands gjøgnum fylgissvein.

Frásøgumaðurin og viðmerkjarin hildu tað verða sjálvsagt, at ein ávísur munur varð millum russiska og føroyska liðið, tá allir á føroyska liðnum eru amatørar, sum hava annað arbeiðið við síðunnar av. Kortini høvdu teir góð orð at bera nøkrum av teimum føroysku landsliðsspælarunum.

Málverjarnir, Levi Nybo og Jens Skipagøtu vóru mettir at standa seg væl. Av útispælarunum løgdu russisku frásøgumennirnir merki til Trónd Kragesteen, Finnur Hansson, og Carl Herup Olsen, sum gjørdi vart við seg í 2. hálvleiki. Teir hildu eisini, at Janus Einar varð treiskur tær báðar ferðirnar hann skoraði. Russisku hyggjarnir fingu eisini at vita, hví besti føroyski spælarin, sum spælir í Danmark ikki var við á liðnum.




*Hóast munurin var stórur, so høvdu russisku frásøgumenninir eisini rósur at bera føroysku spælarunum*

*savnsmynd*

### Verið í Føroyum

1.500 fólk vóru til dystin. Ivan dugir ikki at seta tal á, men metir, at nakrar miljónir hava sæð dystin millum Russland og Føroyar á "Rossija Sport", sum er størsta ítróttarrásin í Russlandi. Tó hevur hondbóltur ikki sama áhuga millum russar, sum fótbóltur og íshokki. Ivan helt tað verða stuttligt at hoyra viðmerkjaran, sum varð ein fyrrverandi sovjetrussiskur landsliðsspælari. Hesin hevði spælt Evropa Cup ímóti VÍF miðskeiðis í 1980-unum. Hann mintist gott aftur á Føroya-túrin, og hann segði hyggjarunum, at hann kundi ikki gloyma tann stóra blíðskapin, sum vestmenningar sýndu teimum fyri góðari fjórðingsøld síðani.

# Máttu skifta flogfar

**Tá føroyska hondbóltslandsliðið skuldi úr Moskva, var einki flogfar, sum hevði kós móti Italia**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kristian Johansen formaður í HSF sigur, at allur ruðuleikin viðvíkjandi flogferðaseðlunum hjá Al Italia stava frá italska flogfelagnum sjálvum.

Orsøkin til, at føroyski hópurin stóð á berum í Moskva, varð at italska flogfelagið hevði ikki boðað frá broytingini, sum í hesum førinum rakti føroyska landsliðshópin.

Eitt starvsfólk hjá Atlantic Airways bleiv innkallað frá síni feriu, og viðkomandi fekk arbeitt seg fram til eina loysn, sum gjørdi tað møguligt hjá russiska hópinum at fara við russiska flogfelagnum, Aeroflot til Italia. Russisku starvsfólkini á flogvøllinum vóru lítið stinn í enskum, og har kom Ivan Eginsson inn í myndina, sum á fyrimyndarligan hátt beindi allar málsligar misskiljingar og aðrar misskiljingar av vegnum. Hetta er tann rætti samanhangurin í málinum. Syndarin er hvørki HSF ella Atlantic Airways, men Al Italia, sum ikki hevur givið hvørki Atlantic ella HSF nakra, sum helst fráboðan um broytingina.